www.sudurras.fo/

# Nýggjur rúnasteinur avdúkaður í Hovi



Heimsins nýggjasti rúnasteinur varð í dag avdúkaður í Hovi í sambandi við tiltakið "Víkingadagar í Hovi". Tað er Hovs Fornminnisfelag, ið reisir hann til minnis um Havgrím og til minnis um heimsins elsta tingstað. Innskriftin hevur m.a. kendu orðingina frá føroyingasøguni: "Hovgrímur [góði] var mikil blótmaður. "

Steinurin vigar 800 kg, og var settur uppá pláss í viðarlundina omanfyri Hovs skúla, tá ið bygdin hevði árliga ruddingardagin 17. mai.

Kristi himmalferðardag helt Hergeir Nielsen røðuna, og tvær smágentur avdúkaði steinin í fagra veðrinum seinnapartin.

Í Føroyum eru tríggir rúnasteinar, herav er bara Kirkjubøsteinurin frá víkingatíðini, helst uml. ár 1000, meðan Sandavágssteinurin er frá miðøldini, og Fámjinssteinurin er frá tíðini aftaná reformatiónini í 1538.

Rúnasteinar eru kendir frá øðrum norðurlondum, serliga úr Svøríki, har meginparturin av teimum uml. 3000 rúnasteinunum eru, og úr Danmark, sum hevur uml. 250 rúnasteinar. Í Norra eru uml. 50 rúnasteinar, harímillum heimsins elsti standandi rúnasteinur Einangsteinen frá 4. øld. Í Íslandi eru ongir, meðan ein er funnin í Norðurgrønlandi. Talan er um Kingittorsuaq-steinin frá miðøldini.

Nú hevur Hov altso eisini ein vakran rúnastein frá 2014, til gleði fyri vitjandi og høvuðbrýggj fyri framtíðar fornfrøðingar.

*Tekstur og myndir: Lasse Jensen*

Kelda: **Suðuroyarportalurin** tann 29. mai 2014

www.sudurras.fo/